
LM-085/2025

Uppskot til broyting í Oljuskattalóg

Desembur 2024


Olja er funnin á føroyskum øki. 8 leitibrunnar eru boraðir.

Ongin leitibrunnur er boraður síðani 2010



Kelda: Jarðfeingi

Vindeygað er opið í løtuni – olja verður útvunnin eystanfyri markið – fleiri útbyggingar eru sannlíkar



Fleiri oljufelt eru funnin skamt eystanfyri Føroyska markið.

Serliga er áhugi fyri feltunum Rosebank go Cambo í løtuni.

Bretska stjórnin fer at brandskatta oljuvinnuna – uttan at loyva endurgjaldi fyri leitiútreiðslur, eins og Noregi ger

Bretska orkuvinnan ávarar stjórnina

Ger Labour stjórnin av at seta ætlanina um at brandskatta og gera umstøðurnar hjá olju- og gassvinnuni uppaftur verri, so fer hetta at raka bæði vinnuna og orkurygdina í Bretlandi.

Risastórar íløgur í orkuvinnuna eru í vanda, um bretska stjórnin ger álvara av at seta fót fyri vinnuni sigur 42 vinnufeløg í skrivi til ráðharra

2024-08-23 14:01



JAN MÜLLER

Hetta gera 42 orku- og veitarafeløg vart við í einum skrivi, sum felagið hjá vinnuni "OEUK", Offshore Energy UK, hevur sent nýggju bretsku stjórnini. Ein heil vinna við hundraðtúsundtals arbeiðsplássum er í vanda, um stjórnin ger álvara av sínum hóttanum at seta fót fyri framtíðar virkseminum.

Formaðurin í felagnum, sum umboðar 400 ymsar fyritøkur og feløg innan samlaðu orkuvinnuna, David Whitehouse, sigur, at vinnan og myndugleikar eiga at samstarva, so tað besta fæst burtur úr mongu arbeiðsplássunum í orkuvinnuni. Hann heitir á stjórnina, nú hon leggur til rættis komandi fíggjarætlan at leggja fram 31. oktober, at taka vinnuna við uppá ráð, nú ein framtíðar orkupolitikkur skal setast út í kortið.

Víst verður á, at íløgur fyri 200 mia. pund eru í vanda, um so er at stjórnin heldur fram við at mótarbeiða vinnuna heldur enn at stuðla henni. Her er eisini talan um tær íløgur, sum olju- og gassvinnan ætla at gera í grøna orkuskiftið mongu komandi árini.


UK offshore sector warns of risks of further tax hikes

Aug. 22, 2024

More than 40 organizations in the UK have issued an open letter warning of the risks posed by the new Labour government's proposed tax increases on offshore oil and gass production



UK energy supply chain companies warn "time is running out" to save jobs and investment



Nýsæland ásannar at grønasta leiðin inniber oljuleiting – fyri at sleppa av við kol, má brúkast olja

Nýsæland tekur av aftur bann móti oljuleiting

Stjórnin fer at taka av bann móti leiting eftir olju og gassi, sum varð samtykt í 2018 at nøkta orkutørvin við verandi varandi orkukeldum.



2024-08-28 15:57




JAN MÜLLER

Hetta nýggja stigið verður tikið til frama fyri orkutrygdina í landinum, nú landið tørvar bæði olju og gass í síni orkuveiting. Stig verða eisini tikin til at steðga forðingum við at innflyta LNG, sum landinum tørvar í stóran mun til tess at nøkta orkutørvin. Christopher Luxon, forsætisráðharri í Nýsælandi sigur sambært Reuters, at mangulin uppá orku seinastu vikurnar hevur fingið

Tað var tann táverandi miðvinstra Labour stjórnin, sum setti bann móti oljuleiting í verk fyri sjey árum síðani. Nú merkir landið so álvarsligu avleiðingarnar av hesi avgerð. Framleiðslan av gassi minkaði við 12,5% í 2023, og fyrstu tríggjar mánaðirnar í ár er hon minkað við 27,8% skrivar Reuters. Hetta hevur skapt ein orkumangul, sum hevur tvingað myndugleikarnar til at brúka meira kol og diesel til at hava netið koyrandi. Varandi orka so sum vatn, vindur og sól hava ikki mengað at nøkta tørvin.

IEA: Heimurin eftirspyr olju nógv ár afturat




Hetta føri (STEPS) gevur innlit í ta kós sum orkugeirin hevur, bygt á nýggjastu marknaðarupplýsingar, tøknikostnaðir og djúptøknar greiningar av galdandi politikkum í øllum londum kring heimin.

IEA: Mett heimsorkueftirspurninginum fram til 2050. Víst verða 3 føri (scenario) alt eftir hvussu væl ið heimsins umlegging til orkukeldur við lægri útláti fer at eydnast. Í øllum førum fer heimurin at brúka stóra nøgd av fossilum orkum í 2050 (brúnu, reyðu og korkalittu økini).

Tey 3 førini eru STEPS = Stated Policies Scenario, APS = Announced Pledges Scenario; NZE = Net Zero Emissions by 2050 scenario. Eindin á grafinum er EJ = Exajoule.

(Kelda: IEA, World Energy Outlook 2024, Total final consumption by fuel and scenario 2023-2050.

IEA: Heimurin eftirspyr olju nógv ár afturat




Altjóða Orkustovnurin EIA:

Mettur heimseftirspurningurin eftir olju fram til 2035 í STEPS førinum.

Sjálvt í førum við skjótari umlegging til alternativar orkukeldur, so fer heimseftirspurningurin at vera millum 95 og 105 mió. føt um dagin (mb/d).

(Kelda: IEA, World Energy Outlook 2024,
Global oil demand in the STEPS and key sensitivities, 2015-2035.

IEA: Heimurin eftirspyr olju nógv ár afturat




EIA: Broyting í heimseftirspurningi eftir olju í ymsum heimspørtum 2023-2035.

Væntað verður at eftirspurningurin eftir olju í Evropa fer at minka við 3,2 mió. føtum um dagin (mb/d), og Norðuramerika at minka við 3,5 mió. føtum um dagin (mb/d).

Hetta sama tíðarskeið fara aðrir heimspartar væntandi at økja um sín eftirspurning eftir olju.

(Kelda: IEA, World Energy Outlook 2024,
Change in global oil demand in selected regions 2023-2035)

Vesturheimurin eftirspyr í stærri mun olju úr tryggum, demokratiskum londum



Stór broj útflutninginum av olju úr Russlandi er hend síðani 2021.

Parturin av oljuni sum verður útfluttur til Vesturheimin er farin úr 59,5% í 2021 til 8,2% í 2023.


Kelda:VisualCapitalist

(https://www.visualcapitalist.com/sp/hf03-how-oil-is-adding-fuel-to-global-fragmentation/)

Visualisering bygd á hagtøl frá IEA (2024, UNCTAD (2024


ES noyðist at innflyta 97,59% av síni olju

Import dependency, crude oil, 1990-2022
(% of net imports to gross available energy)



Source: Eurostat (online data code nrg_ind_id)

Innflutningurin av olju til ES kemur í stóran mun frá ótryggum og ódemokratiskum londum



LM-085/2025

Hvussu fáa vit gongd á oljuleitingina í Føroyum aftur?

Hvat kann gerast?

- Jarðfrøðina fáa vit onki gjørt við…
- Vit fáa gjørt nakað við treytirnar
  - Javnseta vanligan kolvetnisskatt (27%) við partafelagsskatt (18%)
  - (Skattasatsirnir vóru líka (á 27%) tá ið oljuskattaskipanin upprunaliga varð gjørd)
- Senda signal at vísa at vit eru klár at taka ímóti
- Grøna umleggingin í heiminum (serliga frá koli) krevur olju. Vit kunnu gera okkara part í grønu umleggingini við at framleiða orku í tryggum, demokratiskum landi og so umhvørvisvinarliga sum gjørligt.

Broyting av §11, stk. 3 í Kolvetnisskattalógini

Løgtingslóg nr. 26 frá 21. apríl 1999 um at skatta inntøkur av kolvetnisvirksemi

§11, stk. 3. Persónar, ið hava inntøku, sum er nevnd í § 4, stk. 1 og 2, gjalda bert inntøkuskatt til landskassan av tílíkari inntøku eftir einum ásettum prosentstigi, ið svarar til galdandi skattastig fyri partafeløg. Inntøkuskatturin verður at rokna serstakt av inntøku, ið kemur undir § 4, stk. 1 og 2.

Lógarbroyting 7. mars 2000

§ 11, stk. 3. Persónar og feløg, sjálvsognarstovnar, felagsskapir, deyðsbúgv o.o., ið hava inntøku, sum er nevnd í § 4, stk. 1 og 2, gjalda umframt serskatt eftir kapittul 2a inntøkuskatt til landskassan av tílíkari inntøku við 27%. Inntøkuskatturin verður at rokna serstakt av inntøku, ið kemur undir § 4, stk. 1 og 2."


UPPSKOT til Lógarbroyting

Stk. 3. Persónar og feløg, sjálvsognarstovnar, felagsskapir, deyðsbúgv o.o., ið hava inntøku, sum er nevnd í § 4, stk. 1 og 2, gjalda umframt serskatt eftir kapittul 2a inntøkuskatt til landskassan av tílíkari inntøku eftir einum ásettum prosentstigi, ið svarar til galdandi skattastig fyri partafeløg. Inntøkuskatturin verður at rokna serstakt av inntøku, ið kemur undir § 4, stk. 1 og 2

Innihaldið verður eftir uppskotinum meinlíkt upprunaligu lógini


Oljuskattaskipanin frá 1999-2019.

Skipanin innibar framleiðslgjald, at verða ásett í framleiðsluloyvinum.




Oljuskattaskipanin frá 2019-2024 (verandi)

Skipanin innibar ikki framleiðslugjald



Uppskot til oljuskattaskipan 2025-.


Vanligi kolvetnisskatturin verður her lækkaður til 18%, sum er sama støði sum vanligi partafelagsskatturin



LM-085/2025


Uppskot til oljuskattaskipan 2025-.

Vanligi kolvetnisskatturin verður her lækkaður til 18%, sum er sama støði sum vanligi partafelagsskatturin




Skattainntøkurnar minka úr 12% niður í 9% av inntøkuni av sølu av olju

Roknidømi við oljufelti á 550 mió. føt við oljuprísi á 75 USD/fat



Skattainntøkurnar minka úr 24% niður í 23% av inntøkuni av sølu av olju

Roknidømi við oljufelti á 550 mió. føt við oljuprísi á 100 USD/fat



VERANDI SKIPAN: Vanligur Kolvetnisskattur á 27%

UPPSKOT: Vanligur Kolvetnisskattur á 18%

Samandráttur av uppskotinum

Roknidømi við oljufelti á 550 mió. føt við oljuprísi á 75 USD/fat

	Verandi skattaskipan	Uppskot
Intern renting av íløgu eftir skatt (hjá oljufelagi)	20%	21%
Skattur sum % av vinningi	33%	25%
Skattainntøkur	57 mia. kr	43 mia. kr
Nútíðarvirði av skattainntøkum (10%)	14 mia. kr	10 mia. kr

Samandráttur av uppskotinum

Roknidømi við oljufelti á 550 mió. føt við oljuprísi á 100 USD/fat

	Verandi skattaskipan	Uppskot
Intern renting av íløgu eftir skatt (hjá oljufelagi)	27%	28%
Skattur sum % av vinningi	42%	41%
Skattainntøkur	134 mia. kr	129 mia. kr
Nútíðarvirði av skattainntøkum (10%)	32 mia. kr	29 mia. kr

LM-085/2025